# unnilsvenjing



*Løgregla, sløkkilið, sjúkrabilar og enntá ein tyrla tóku lut í venjingini í Norðoyatunlinum í gjár, har tilsamans 100 fólk vóru við*

*Myndir: Høgni Thomsen*



**Sløkkiliðið má útbúgvast**

Av teimum tingunum, har tað longu nú er greitt, at ábøtur mugu gerast, nevndi Per Teglegaard sløkkiliðið. Hann vísti á, at teimum vantaði tekniska og taktiskan førleika, og tað sást millum annað aftur, tá fólk skuldu klippast leys úr bilum.

– Útgerðin sløkkiliðið hevur er bæði nýggj og góð, men her má kommunan taka eina avgerð um, hvørt sløkkiliðið skal útbúgvast meiri ella ikki, segði Per Teglegaard.

Tá tað var sagt, so vísti Per Teglegaard á, at um ein venjing sum hendan, ikki kundi vísa á, at brúk var fyri útbúgving, so var ikki talan um eina góða venjing

– Tað er altíð brúk fyri at bøta um viðurskifti, slerdi Per Teglegaard fast.

Venjingin í gjárkvøldið er tann fyrsta av sínum slag í Norðoyatunlinum. Áður hava líknandi venjingar verið í Vágatunlinum, men Per Teglegaard metir ikki, at tað ber til at samanbera hesar kanningar. Men hann kundi tó staðfesta, at bæði vitanin og fakligheitin var betri nú, í mun til venjingina í Vágatunlinum.


